# Molde vann uttan Jákup

**Jákup Mikkelsen var ikki á liðnum, tá Molde um vikuskiftið vann tryggan sigur**

TIPPELIGAN
*Jákup Mørk*



*Eftir bert einum knøppum mánaði í nýggja felagnum, tykist Jákup Mikkelsen longu at vera settur á beinkin, men vónandi fer hann at vinna plássið millum stengurnar aftur*

At tað gongur skjótt báðar vegir í fótbóltsheiminum, kann føroyski landsliðsmálverjin, Jákup Mikkelsen, helst skriva undir uppá.

Mikudagin var hann besti maður á vøllinum í heiðurliga 2-0 tapinum hjá Føroyum fyri Jugoslavia, og millum annað hevði hann bjarging, sum væl tolir samanbergin við tær so væl kendu bjargingarnar hjá Gordon Banks Mexico í 1970 og hjá Peter Schmeichel í Wien í 1997.

Sunnudagin var tó aftur gerandisdagur hjá Jákupi. Tá Molde fyri viku síðani tapti 4-3 fyri botnliðnum, Bryne, mettu fjølmiðlarnir, at Jákup var sekur í onkrum av málunum, og tískil var Jákup ikki á liðnum, tá Molde spældi móti Strømsgodset sunnudagin.

Ístaðin vardi ungi Knut D. Lillebak málið í 3-0 sigrinum. Við einum reinum búri tykist tað tí vera ivasamt, um Jákup sleppur inn aftur á liðið í bræði, ella um hann bara verður noyddur at brynja seg við toli.

## Ófriðarligt

Ananrs hevur verið rættiligt rok í Molde seinastu vikuna. Eigari felagsins, millióningur, Røkke, hevur givið leiðsluni boð um, at nú skal sparast, og sambært VG er talan um at minka rakstrarútreiðslurnar við einum tíggju milliónum.

Hetta hevur longu viðført, at tveir av stuðulsleikarum felagsins eru seldir, og tað er meira, enn áskoðaranir vilja finna seg í. Ikki minst tí miðvallarin, Odd Inge Olsen, varð seldur til Rosenborg, sum er liðið, sum Molde vil kappast við.

Undan dystinum móti Strømsgodset vísti áskoðarabólkurin sína ónøgd við at fara av stadion beint fyri dystarbyrjan, og í VG í dag siga spælararnir seg eisini skilja støðuna hjá áskoðarunum.

Røkke stendur tó við sítt, og har afturat hevur ríkmaðurin sagt, at hóast hetta kann líkjast einari útsølu, so broytir hetta framvegis ikki málið íu felagnum, sum er at gerast meistari innan 2005.

# Todi varð fagnaður

**Annan dystin upp í slag taptu teir í FCK, men við føroyskum eygum var tað positivt, at Todi Jónsson aftur var síggja á vøllinum**

SUPERLIGA
*Jákup Mørk*

Tað tykist sum um stóra uppgávan ímóti Lazio á útivølli í løtuni fer avstað við meginpartinum av sálarligu orkuni hjá Toda og teimum í FCK. Eftir at teir í heyst komu ájavnt superligumetinum upp á 22 dystir á rað uttan at tapa, hevur liðið nú tapt tveir dystir á rað, og í báðum førum hevur talan verið um mótstøðulið, sum fótbóltsserfrøðingarnir hava spátt eina tilveru nær botninum.

## Todi fagnaður

Hesa var tað AB, sum tók øll stigini frá FCK, og tað var enn tá í Parkini, at hetta hendi.

AB Hevði tó ikki nakra stóra leikliga yvirvág, men teir megnaðu at gera sær av sínum møguleikum, og tá FCK so misnýttu onkrar risamøguleikar, kundi tað ikki ganga stórt øðrvísi.

Hóast tapið, so kunnu vit við føroyskum eygum fegnast um, at Todi Jónsson, sum hevur verið vøddaskaddur, fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum var á vøllinum, tá FCK spældi fríggjadagin.

Todi kom á vøllin stutt inn í seinna hálvleik, og tað var sjónligt – ella ljóðligt – at tað ikki bert eru føroyingar, sum hava saknað góðu fótbóltsevni hansara. Hvør sál í Parkini sang, at tey vildu hava Toda á vøllin, og fagnaðurin var eisini stórur, tá Kent Karlsson so sendi klaksvíkingin inn.

Todi var eisini um reppi at siga takk fyri álitið við einum máli, men hóast fleiri góðar royndir, so mátti hann eins og liðfelagarnir fara málleysur av vøllinum.

Todi sýndi annars, at hann kropsliga er veruliga komin fyri seg aftur. At kalla hvørja ferð hann fekk bóltin, var vandi á ferð, og var tað ikki fyri ein sera væl leikandi Steven Lüstu í AB-verjuni.



*Todi Jónsson varð stórliga fagnaður, tá hann varð skiftur inn í seinna hálvleiki í dystinum móti AB*

# Javnleikur í Hull

**Í ein hálvleik kringsettu leikararnir hjá Hull brotsteigin hjá Plymouth, men mál komu eingi**

ONGLAND
*Jákup Mørk*

Julian Johnsson og liðfelagarnir í Hull spældu leygardagin fyrsta heimadystin í júst byrjaða kappingarárinum. Dysturin var móti Plymouth, og úti við 11.000 áskoðarar vóru komnir til stadion at hyggja at nyggja liðnum hjá Hull, sum hesa ferð hevði seks leikarar, sum eru komnir til felagið í summarsteðginum. Teirra millum er Julian Johnsson, sum aftur hesa ferð spældi samfullar 90 minuttir fyri Hull.

Áskoðararnir fingu tó ikki sigurin, sum tey høvdu vónað at sæð, men hinvegin fingu tey í øllum førum prógv fyri, at Hull hevur eitt sera sterkt lið í ár. Sambært bretsku fjølmiðlunum sat Hull fullkomuliga á dystinum, og ikki minst í seinna hálvleiki stóð nógv á hjá gestunum.

Við eini stinnaru verju og einum frágera væl leikandi málverja eydnaðist tó Hull at halda tætt, og ivaleyst mundu teir vera betri nøgdir enn heimaliðið um einsamalla stigið.

# Ringur føroyadagur

**Allir føroyingarnir í næst bestu donsku deildini taptu um vikuskiftið**

DANMARK
*Jákup Mørk*

Teri tríggir føroyingarnir í næst bestu donsku deildini vóru allir á tapandi liðnum um vikuskiftið.

Óli Johannesen og Hvidovre hittu á útivølli fyrrverandi felagið hjá Jan Allani Müller, AC Horsens, og úrslitið gjørdist her eitt tap upp á 2-0.

Tað var eisini úrslitið, tá liðið hjá Atla Gregersen, Randers Freja, tók ímóti Køge, sum verður mett millum sterkastu liðini í deildini.

Triði føroyingurin í deildini, Øssur Hansen, mátti eisini taka til takkar við einum tapi. Á útivølli mátti B93 lúta 3-1 fyri Frem, so alt í alt var dagurin einki serligur hjá føroyingunum í Danmark.



## Støðan, enska 3. deild

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1Luton | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 4 | 1 | 3 | 6 |
| 2Bristol R. | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 3 | 1 | 2 | 6 |
| 3Hartlepool | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 4 | 2 | 2 | 4 |
| Hull | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 3 | 1 | 2 | 4 |
| 5Swansea | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 3 | 1 | 2 | 4 |
| 6Halifax | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 7Rochdale | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 8R&D | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 1 | 0 | 1 | 4 |
| 9Southend | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 1 | 0 | 1 | 4 |
| 10York | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 3 | 1 | 2 | 3 |
| 11Darlington | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 12Shrewsbury | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 2 | 3 | -1 | 3 |
| 13Kidderm. | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 1 | 2 | -1 | 3 |
| 14Leyton O. | 2 | 0 | - | 2 | - | 0 | 1 | 1 | 0 | 2 |
| 15Mansfield | 2 | 0 | - | 2 | - | 0 | 1 | 1 | 0 | 2 |
| 16Cheltenham | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 2 | 3 | -1 | 1 |
| 17Lincoln C. | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 1 | 2 | -1 | 1 |
| 18Oxford Utd. | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 1 | 2 | -1 | 1 |
| 19Plymouth | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 0 | 1 | -1 | 1 |
| 20Exeter | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 2 | 4 | -2 | 1 |
| 21Macclesfield | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 2 | 4 | -2 | 1 |
| 22Carlisle | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 0 | 2 | -2 | 1 |
| 23Scunthorpe | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 1 | 3 | -2 | 0 |
| 24Torquay | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 0 | 4 | -4 | 0 |

# Bradford er á odda

**Claus Bech Jørgensen hevur enn ikki fingið tíð á vøllinum hjá Bradford, sum er á odda í næst bestu ensku deildini**

ONGLAND
*Jákup Mørk*

Hálvi føroyingurin, Claus Bech Jørgensen, sum í summar flutti eina deild upp úr Bournemouth til Bardford, tykist ikki at hava serliga lætt við at vinna sær sess á liðnum.

Higartil hevur Bradford leikt tveir dystir, og við seks stigum fyri hesar, hevur liðið fyri fyrst vunnið seg fram á eitt fysta pláss í ensku 1. deild.

## Kend nøvn

Tað eru nú heldur ikki hvør sum helst, sum Claus Bech Jørgensen stríðist við, í royndunum at vinna sær pláss á liðnum. Væl kend nøvn, sum áður hava verið at sæð í bestu ensku deildini, eru at finna á liðnum, og millum teir leikarar, sum hann kappast við á framrættaðu miðvallar- og álopsplássum eru millum aðrar Eoin Jess, Benito Carbone og Lee Sharpe, og meðan hesir allir hava prógva, hvør dugur er í teimum, er øðrvísi statt hjá Jørgensen, sum bert hevur spælitíð í triðbestu ensku og næst bestu donsku røðini at vísa á.

Alt hetta kann tó broytast nakað skjótt, um so er, at Bradford finnur onkran keypara til teir leikarar, sum fáa mest í lønarposan. Leiðslan í felagnum hevur ynski um at byggja eitt nýtt lið upp, men áðrenn hetta kann gerast, skal tamarhald fáa á fíggjarligu viðurskiftini í felagnum, og léttasti hátturin at gera hetta, er við at skerja útreiðslurnar.

Hvørt hetta so fer at tryggja hálva føroyingunum meira tíð á vøllinum, er ilt at siga, men tað verður so neyvan torførari framyvir, enn tað er í løtuni.

## Støðan, danska 1. deild

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1Frem | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 9 | 2 | 7 | 9 |
| 2Farum | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 9 | 6 | 3 | 7 |
| 3HFK Sønderj. | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 7 | 4 | 3 | 7 |
| 4AC Horsens | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 4 | 1 | 3 | 7 |
| 5Køge | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 4 | 1 | 3 | 7 |
| 6Brønshøj | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 6 | 6 | 0 | 6 |
| 7Herfølge | 3 | 1 | - | 2 | - | 0 | 3 | 2 | 1 | 5 |
| 8B 1909 | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 4 | 3 | 1 | 4 |
| 9B93 | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 4 | 5 | -1 | 4 |
| 10FC Aarhus | 3 | 0 | - | 2 | - | 1 | 4 | 5 | -1 | 2 |
| 11Skive | 3 | 0 | - | 2 | - | 1 | 4 | 6 | -2 | 2 |
| 12Fredericia | 3 | 0 | - | 1 | - | 2 | 5 | 7 | -2 | 1 |
| 13Hvidovre | 3 | 0 | - | 1 | - | 2 | 3 | 6 | -3 | 1 |
| 14B 1913 | 3 | 0 | - | 1 | - | 2 | 2 | 5 | -3 | 1 |
| 15Randers F. | 3 | 0 | - | 1 | - | 2 | 1 | 4 | -3 | 1 |
| 16Kolding IF | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 1 | 7 | -6 | 0 |

## Støðan, norska tippeligan

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1Rosenborg | 19 | 12 | - | 5 | - | 2 | 53 | 22 | 31 | 41 |
| 2Lillestrøm | 18 | 12 | - | 3 | - | 3 | 46 | 24 | 22 | 39 |
| 3Viking | 19 | 11 | - | 5 | - | 3 | 36 | 21 | 15 | 38 |
| 4Brann | 19 | 11 | - | 4 | - | 4 | 53 | 30 | 23 | 37 |
| 5Stabæk | 19 | 11 | - | 1 | - | 7 | 36 | 31 | 5 | 34 |
| 6Odd. Grenl. | 18 | 9 | - | 4 | - | 5 | 36 | 25 | 11 | 31 |
| 7Molde | 19 | 9 | - | 4 | - | 6 | 39 | 31 | 8 | 31 |
| 8Moss | 19 | 7 | - | 1 | - | 11 | 25 | 36 | -11 | 22 |
| 9Sogndal | 19 | 6 | - | 4 | - | 9 | 29 | 43 | -14 | 22 |
| 10Lyn | 19 | 4 | - | 7 | - | 8 | 32 | 35 | -3 | 19 |
| 11Bodø/Glimt | 19 | 4 | - | 6 | - | 9 | 28 | 36 | -8 | 18 |
| 12Strømgodset | 19 | 3 | - | 6 | - | 10 | 31 | 56 | -25 | 15 |
| 13Tromsø | 19 | 4 | - | 0 | - | 15 | 15 | 40 | -25 | 12 |
| 14Bryne | 19 | 3 | - | 2 | - | 14 | 19 | 48 | -29 | 11 |

## Støðan, danska superligan

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1Brøndby | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 14 | 2 | 12 | 12 |
| 2AaB | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 7 | 4 | 3 | 9 |
| 3Lyngby | 5 | 2 | - | 3 | - | 0 | 5 | 2 | 3 | 9 |
| 4Vejle | 5 | 2 | - | 2 | - | 1 | 9 | 8 | 1 | 8 |
| 5FCK | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 7 | 6 | 1 | 7 |
| 6AB | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 7 | 6 | 1 | 7 |
| 7FCM | 5 | 1 | - | 3 | - | 1 | 3 | 3 | 0 | 6 |
| 8OB | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 4 | 5 | -1 | 6 |
| 9Viborg | 5 | 1 | - | 2 | - | 2 | 5 | 6 | -1 | 5 |
| 10Esbjerg | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 3 | 4 | -1 | 4 |
| 11Silkeborg | 5 | 0 | - | 2 | - | 3 | 2 | 11 | -9 | 2 |
| 12AGF | 5 | 0 | - | 1 | - | 4 | 1 | 10 | -9 | 1 |

